**9. flokkur**
**Venjingarskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 3/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
(føroyskt mál)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 2, stk. 3 verður seinasta pkt. orðað soleiðis:
   "Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði, fólkaræði og móðurmálskærleika."

2) Í § 4 verður aftaná stk. 4, sum nýtt stk. sett:
   "*Stk. 5.* Alt undirvísingartilfar skal vera á føroyskum, tó ikki í lærugreinunum danskt, enskt, týskt og latín."

Stk. 5, 6, 7, 8, 9 og 10 verða eftir hetta stk. 6, 7, 8, 9, 10 og 11.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2015.

**Viðmerkingar:**

Vit valdu at gera hesi uppskot, tí at vit ynskja, at ungdómurin er meira tilvitaður um tað føroyska málið. Vit vilja hava, at børn og ung vaksa upp í einum føroyskum umhvørvi, har tey eru tilvitað um, hvussu lítið tað føroyska málið er. Okkara grundgeving fyri at gera hetta uppskot er, at varðveita okkara føroyska móðurmál, ið ikki sæst serliga væl í ungdóminum.

Hetta uppskot fer at gera tað so, at Føroyar verður eitt føroyskari samfelag, og at børn og ung í fólkaskúlanum tosa meira føroyskt, tí tey verða noydd at hava tað í skúlanum. Man hoyrir nógv eingilskt í málinum hjá teimum ungu, so vónandi fer hettar at gera tað, at unga fólkið fer at tosa nógv meir føroyskt.

Hetta uppskot verður ein góð íløga fyri føroyska samfelagið, tí hettar ber við sær, at rithøvundar og týðarar fáa meira at arbeiða við, og at tað verða fleiri føroyskar bøkur, ið kunnu geva okkum kunning um alheims vitan.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Hilbert Johannesen — Magnus Heinason Eysturoy — Jana Nielsen

Jasmin Mote — Barbara Gotved Petersen — Sólrún Thomsen

Jóhannus Suma Poulsen — Askur Skaalum Gregersen